Hans Engell, v.m. og Kurt Strand, h.m. vóru høvuðspersónar á fakfestivalinum leygardagin, har teir við fyrilestrum rúnarbundu føroysku tíðndaføldina

Mynd: Jan Müller

Væleydnaður fakfestivalur

Leygardagin 29. februar varð stórur fakfestivalur hildin fyri føroyska fjølmiðlaheiminum í hølum á Sjómansskúlanum í Havn. Størstu nøvnini á festivalinum vóru Hans Engell, fyrrverandi politikarin og núverandi stjóri á Ekstrablaðnum, og Kurt Strand, arroganti og til tíðir umstríddi sjónvarpsverturin á Danmark Radio. Dánjal Højgaard úr Útvarpi Føroya varð av starvsfeløgum kosin ársins føroyski journalistur. Systrarnar Ása og Annika Joensen skipaðu fyri tiltakinum

FAKFESTIVALUR

Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Leygardagin skipaði samtakið Synergi fyri fjølmiðlaskeiði á Sjómansskúlanum í Havn, og høvdu øll føroysk tíðindafólk høvi at hoyra bæði føroyskar og danskar fyrilestrahaldarar.

Størstu nøvnini vóru óivað Hans Engell, stjóri á Ekstrablaðnum, og Kurt Strand, sum í Danmark er vorðin kendur í sjónvarpssendingini Profilen á Danmark Radio. Hans Engell hugleiddi um støðuna hjá fjølmiðlum í Danmark og Føroyum í 2004, og serliga varð dentur lagdur á eitt rák, sum m.a. rakar bløðini sera meint við lækkandi figgjarligum karmum at virka undir.

Við fleiri dømum úr sendingini Profilen hevði Kurt Strand fyrilestur um spyrjiteknikk og journalistiska metodu, og var hann sera bergtakandi við beinraknum dømum um trupulleikar og vansar, ein tíðindamaður í sínum yrki stendur í.

Fleiri føroyingar

Umframt donsku kanónirnar vóru fleiri føroyingar, sum hildu fyrilestrar um ymisk viðurskifti, og at enda var orðið frítt. Millum annað hugleiddi Tróndur Djurhuus um tøknifrøðiligu menningina og framtíðarútlit. Menningarleiðarin hjá Føroya Tele sá fyri sær eina fiktiónskenda og samstundis eisini ræðandi samfelagsmynd, har øll og eingin vóru fjølmiðlar. Øsssur Wintereig hevði ein provokerandi fyrilestur um ógegni, og Kári Durhuus lýsti føroysku fjølmiðlarnar í 2004 og eftirlýsti politiskan vilja til framburð og menning á fjølmiðlaøkinum. Umframt hesar var eisini høvi at hoyra formannin í Blaðmannfelagnum, Edvard í Skorini Joensen, Ellindur Egilsstrøð úr Gallup Føroyar og løgfrøðingin Jonhard Klettheyggj.

Landsstýrið var væl umboðað, har bæði mentamálaráðharrin og løgmaður móti endanum tóku orðið, meðan fleiri aðrir journalistar eisini løgdu fram síni hugskot um, hvussu føroyski fjølmiðlaheimurin kann mennast.

At enda avdúkaði ordstýrarin Bjørt Samuelsen, hvør skuldi gerast ársins tíðindamaður, og fall heiðurin til Dánjal Højgaard úr Útvarpi Føroya. Lesið aðrastaðni á síðuni viðtal við hann.

Løgmaður ynskir ársins tíðindamanni, Dánjali Højgaard, tillukku við heiðurinum á fakfestivalinum leygardagin

Mynd: Jan Müller

Dánjal Højgaard,

Redaktiónirnar

- Føroysku fjølmiðlaleiðslurnar eiga at skapa betri umstøður til dýpd og atfinnandi tíðindaflutning, og undanførslurnar um vantandi pening og starvsfólk eru ikki nøktandi, um tað bert verður raðfest rætt, er boðskapurin hjá 43 ára gamla Dánjali Højgaard úr Útvarpi Føroya, sum leygardagin varð kosin ársins tíðindamaður av starvsfeløgum sínum. Í viðtalu eftirlýsir hann eisini betri eftirútbúgving-armøguleikar og sigur sína hugsan um, hvørjar eginleikar ein góður tíðindamaður skal hava

ÁRSINS TÍÐINDAMAÐUR

Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

43 ára gamli Dánjal Højgaard, sum í løtuni starvast í Útvarpi Føroya, varð leygardagin kosin ársins tíðindamaður av starvsfeløgum sínum undir fakfestivalinum fyri føroysku fjølmiðlarnar. Dánjal er útbúgvin tíðindamaður í Noregi, og hevur hann eisini starvast á bæði Dimmalætting og Sosialinum, áðrenn hann í Útvarpi Føroya hevur latið journalistisku dygdir sínar koma Føroya fólki til góða við sendingum sum Vespan, Í andgletti o.s.fr. Dánjal Højgaard hevur ikki hug at vísa á, hvørjir orsøkirnar eru til henda heiður.

– Mær dámar fyrst og fremst betri at sita hinumegin borðið og gera samrøðuna, og hini mugu døma um, hví eg fekk heiðurin, men eg taki tað sum eitt tekin um, at arbeiðið við t.d. Vespuni hevur verið neyðug, har farið varð meiri atfinnandi í dýpdina, sigur Dánjal Højgaard. Hann leggur afturat, at fleiri onnur saktans kundu fingið sama heiður, tí sum við øllum tíðindaflutningi krevjast fleiri fólk at fáa eina verkætlan at eydnast. Spurdur, hví t.d. Vespan ikki helt á, var hetta sambært Dánjali ongantíð endamálið.

– Talan var meiri um eina avmarkaða verkætlan enn eina varandi sending, og vit gjørdu so tíggju sendingar í tríggjar mánaðir, sigur Dánjal Højgaard.

Tíðindafólk uttan møguleikar

Føroyski fjølmiðlaheimurin líður sambært ársins tíðindamanni undir vantandi vilja frá redaktiónunum at skapa betri arbeiðsumstøður og harvið betri tíðindagóðsku.

– Eg vóni, at redaktiónirnar fara at raðfesta rættari í framtíðini, so kritiski journalistikkurin kann koma til sjóndar. Tað verður altíð sagt, at ov lítið av peningi og fólki ger tað ógjørligt at framleiða djúpan, gjøgnumførdan og kritiskan tíðindaflutning, men hetta er heldur ein spurningur um raðfesting, sigur Dánjal Højgaard. Hann leggur afturat, at í vanliga tíðindameldrinum gerast tíðindamenn bert vatnberarar uttan at fáa møguleikan at bora.

– Um vit t.d. taka Sosialin og Dimmu, sum koma út fimm ferðir um vikuna, skuldi t.d. ein tíðindamaður hvønn mánaða fingið eina viku at arbeiða, uttan at verða noyddur at framleiða tíðindi til kongaliga hoffið hvønn dag. Við hesi raðfesting eigur tað at lata seg gera at fáa góðskuna í hásætið við meiri tíð og betri arbeiðsumstøðum til tíðindafólkið, sigur Dánjal Højgaard.

Hann heldur tað samstundis vera hugstoytt, at besti og mest avdúkandi journalistikkurin í nýggjari tíð er gjørdur av freelance tíðindamonnum, og í hesum høpi nevnir hann umstríddu bókina Skjót Journalistin, sum Øssur Winthereig og Grækaris Magnussen stóðu fyri.

– Um vit t.d. taka Sosialin og Dimmu, sum koma út fimm ferðir um vikuna, skuldi t.d. ein tíðindamaður hvønn mánaða fingið eina viku at arbeiða, uttan at verða noyddur at framleiða tíðindi til kongaliga hoffið hvønn dag. Við hesi raðfesting eigur tað at lata seg gera at fáa góðskuna í hásætið við meiri tíð og betri arbeiðsumstøðum til tíðindafólkið, sigur Dánjal Højgaard

Mynd: Jan Müller

ársins tíðindamaður:

sleppa ov lætt

– Hetta eigur at geva leiðslunum nakað at hugsa um, og tað er spell, at vanliga tíðindafólkið ikki hevur møguleikan at framleiða slíkan avdúkandi og atfinnandi tíðindaflutning, sigur Dánjal Højgaard. Við støði í hesi bókini og avrikunum í SVF heldur Dánjal Højgaard, at Øssur Winthereig hevði uppiborið heiðurin at gerast ársins tíðindamaður.

Eftirútbúgving eitt krav

Umframt at skapa nøktandi arbeiðsumstøður er uppgávan hjá redaktiónunum sambært Dánjali Højgaard eisini at gera journalistikk til eitt lívsstarv, m.a. við eftirútbúgving og førleikamenning.

– Um ein journalistur skal halda og kunna nýtast eftir nógv ár í starvinum, er alneyðugt hjá leiðslunum at samskipa eftirútbúgving og førleikamenning við nýggjum íblástri til tíðindafólki, og í løtuni er hetta als ikki sjónligt, heldur 43 ára gamli tíðindamaðurin. Hann sigur, at tað verður koyrt á ungu journalistarnar í eini tíggju ár uttan nakra førleikamenning við nýggjum avbjóðingum, og tá kann alt steðga upp.

– Ein útbúgving gevur tær nýggj amboð og nýggjan íblástur, og skal gravandi journalistikkur verða eitt lívsstarv, er hetta eitt krav, sum enn ikki verður gingið á møti í Føroyum, sigur Dánjal Højgaard. Umframt starvið sum útvarpsmaður er hann sjálvur farin undir víðari lesna í løgfrøði, og er endamálið at fáa eina trý ára bachelor útbúgving.

– Fyri meg er henda eftirútbúgving alneyðug, skal eg halda fram í yrkinum, slær Dánjal Højgaard fast.

Indignatión

Spurdur, hvørjar eginleikar ein góður tíðindamaður skal hava, nevnir Dánjal í fyrstu syftu evnini at undrast og seta grundleggjandi atfinnandi spurningar í øllum viðurskiftum.

– Her hava vit nógv at læra frá børnunum, sum undrast og seta tað, vit ofta kalla "býttar" spurningar, sum í veruleikanum eru teir bestu og mest grundleggjandi. So skjótt vit taka alt fyri givið uttan henda eginleika, koma vit á eitt síðuspor, og tá er vandi á ferð, heldur Dánjal Højgaard. Hetta er sambært honum nakað, ein stutt sagt má leggja seg eftir at læra.

– Ein kann sjálvsagt hava nakrar viðføddar eginleikar í sær, men í stóran mun má ein tilvitað leggja seg eftir hesum og hava ein vilja at læra hesar grundleggjandi journalistisku dygdir, heldur Dánjal Højgaard. Umframt hesi evni nevnir hann indignatiónina sum ein sera týðandi part í yrkinum, og hóast hann lítillátin ikki metir seg sjálvan hava hesar eginleikar, eru hetta nøkur grundleggjandi ideal.

– Á ein ella annan hátt má ein hava eina tráan eftir rættvísi, ein eldhuga at koma órættvísi til lívs og verja sannleikan, at vera forharmaður um okkurt og trampandi koma motiveraður til arbeiðis. Hetta skuldu vit tíðindamenn havt meiri av, tí annars gerst starvið skjótt til ómotiverað umsitingararbeiði, sigur Dánjal Højgaard, sum eftirlýsir hesa indignatiónina. Í orðabókini er orðið allýst at vera ein vreiði vegna órættvísi og óndskap.

– Hetta merkir sjálvsagt ikki, at vit ikki skulu vófara allar partar eins og meta objektivt um tað, vit arbeiða við. Allir partar skulu hava trygd fyri objektiviteti og perspektivering, og t.d. er mannagongdin í málinum um Johan Dahl nakað, ein kann seta spurnartekin við, heldur 43 ára gamli Dánjal Højgaard at enda, sum leygardagin varð kosin ársins journalistur, og sum við sínum uppskotum og áskoðanum aftur setir eitt afturvendandi kjak í fokus í føroyska fjølmiðlaheiminum.

Løgmaður vil hava fjølmiðlaráðgeva

- Føroyska stjórnin er kanska tann einasta í heiminum, sum ikki hevur samskipandi fjølmiðlaráðgevar í aðalráðunum, og tískil umhugsa vit at fáa meiri skipaði viðurskifti við nýggjari kunningardeild í Tinganesi, sigur Jóannes Eidesgaard løgmaður eftir fjølmiðlafakfestivalin leygardagin

NÝGGJ KUNNINGARDEILD

Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Fyri fimm árum síðani skrivaðu tíðindamenninir Kári Durhuus og Per Højgaard álit um, hvussu almenna fyrisitingin á betri hátt kundi skipað sín tíðindaflutning mótvegis fjølmiðlunum, men síðani tá hevur einki verið at sæð frá hesi ætlan.

Nýggi løgmaður okkara Jóannes Eidesgaard var saman við fleiri landsstýrismonnum til staðar á fakfestivalinum leygardagin, og júst hesin spurningurin var eisini uppi at venda. Løgmaður ásannar, at í løtuni er talan um alt ov tilvildarligt samskifti millum stjórn og fjølmiðlar, og at hann tískil umhugsar at seta fólk burturav at taka sær av tíðindaflutningi.

– Við hesum høvdu vit sloppið undan misskiljingum, har mál ikki høvdu farið av sporinum, sum vit ofta sígga í dag, og umframt hetta høvdu vit tryggjað okkum eitt professionellari samskifti, har fjølmiðlarnir eisini fingu kvalifiserað mótspæl, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann leggur dent á, at ein als ikki skal síggja fjølmiðlarnar og politikararnar sum mótpartar men heldur sum tveir hornasteinar í eini demokratiskari skipan og samskifti.

Eingir spindoktarar

Løgmaður leggur dent á, at ætlanin í fyrstu syftu ikki er ítøkilig, men hann metir tað vera sannlíkt, at okkurt verður gjørt á økinum.

– Ætlanin er ikki at seta eina heila deild at taka sær av tíðindaflutningi úr Tinganesi, og í mínum eygum er bert ein fjølmiðlaráðgevi í fyrstu syftu nóg mikið, heldur Jóannes Eidesgaard. Skrivaða álitið hjá Per Højgaard og Kára Durhuus leggur eisini upp til júst hetta, so figgjarligi parturin er ikki nakar trupulleiki at realisera álitið.

Spurdur, um hetta er fyrsti liður í eini menning fram ímóti danska embætisverkinum á tremur við pressuserfrøðingum og spindoktarum, er løgmaður avvísandi.

– Ein spindoktari er ein, sum arbeiðir fyri stjórnina við einum partapolitiskum endamálið, og hevur hetta á ein ella annan hátt eisini ein negativan klang. Hetta er als ikki ætlanin. Talan er stutt sagt um at fáa meiri professionell og skipað samskifti millum okkum og fjølmiðlar, tí hetta er í dag neyðugt, undirstrikar Jóannes Eidesgaard.

Tíðirnar broyttar

Løgmaður samanber í hesum høpi við tíðina fyri tíggju árum síðani, tá hann seinast sat í Tinganesi, og ásannar hann, at viðurskiftini millum politikk og fjølmiðlar er broytt munandi.

– Fyrr var alt meiri afturlatið, men við opna nútíðarsamfelagnum hava fjølmiðlarnir størri ávirkan og harvið týdning, og tískil er neyðugt við broytingum á økinum, sigur løgmaður.

Enn er tó einki ítøkiligt uppskot á borðinum um nýggja fjølmiðlaserfrøði í Løgmálaráðnum, men er hetta sambært løgmanni eitt øki, sum í framtíðini skal viðgerast og betrast til frama fyri allar partar.